# Gandakallur á fløgu og í Rex

**Brandur Jacobsen, trummuleikari, hevur á øðrum sinni givið út fløgu,ið kallast A wizards journey. Í kvøld spæla Brandur og hansara menn í Rex**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Á ferð við tónleikaligum gandakalli. Nakað soleiðis kann ein hóskandi byrja umrøðu av nýggju fløguni hjá Brandi Jacobsen, A wizards journey.

Hetta er onnur fløgan hjá trummuleikaranum Brandi Jacobsen. Talan er um jazz-tónleik, tónleik, ið er improviserandi og sum verður settur á hillina, ið nevnist norðurlendskur jazzur. Eisini sambært Brandi sjálvum.

At trummuleikarar geva solofløgur út er í sjálvum sær sjáldsamt. At siga, at fløgan er sjáldsom, er kanska at gera ov nógv av, men helst er tað so, at hetta er ikki tónleikur, ið stóra fjøldin lurtar eftir í gerandisdegnum. Og tí ikki tónleikur, ið kemur út í Føroyum á hvørjum degi.

### Hugløg

Men talan er um flott løg, sum trummuleikarin hevur komponerað á Rhodes klaver, sum hann eisini spælir á fløguni.

Góðu tónleikararnir, ið Brandur hevur við sær, fáa eisini kabalina at ganga upp.

Aðrastaðni hevur verið nevnt, at hetta eru undirløg, løg ið vanta melodi. Góð til filmtónleik t.d.

Eri ikki heilt samdur, men partvís kann hetta sigast. Í støðum er kanska nakað tunt. Men styrkin við slíkum tónleoki er júst opinleikin. Bæði hjá lurtarum, men ikki minst hjá tónleikarum.

Her er rúm fyri improvisatión. Talan er í stóran mun um huglag, stemning. Og síðani verður bygt kring hetta og burturúr kemur ávíst huglag, kanska fleiri. Nakað sum tá málarar heldur práta um litir og ljós, heldur enn motiv, myndevni. Sveimandi, heldur onkur - gott og flott, siga onnur.

Ferðin við fívlinum, gandakallinum, er spennandi og fjølbroytt, hóast fá ljóðføri. Og styrkin er ymsu hugløgini og góðu tónleikararnir, ið megna uppgávuna at tulka hesi.

At umrøða hugløg og abstrakatar myndir kann skjótt gerast til tóm og doyvandi orð, sum eru betri ósøgd. Her skal verða talan um upplivingina hjá hinum einstaka av ávísa verkinum.

### Góð manning

Brandur er royndur í leikum. Men saman við júst hesi manningini hevur hann eisini drúgvar royndir. Bólkurin var grundarlagið undir fyrstu fløguni hjá Eivør og nevndist tá Ivory.

Brandur spælir á nýggju fløguni trummur, ásláttur og Rhodes, Mikal Blak spælir bass, og Búi Dam guitar. Afturat sær hava hesir fingið Ólav Olsen á trompet,

Og Brandur hevur sjálvur nevnt í viðtali, at hetta var gott val, tí Ólavur er dugnaligur og riggar saman við manningini.

### Livandi

Tónleikaslagið ger, at tónleikurin ofta er líka góður á palli, sum á fløgu. Tey, sum hava ognað sær fløguna,hava møguleika at hoyra tónleikin live í kvøld. Tað hava tey, sum umhugsa at keypa fløguna eisini.

Tí í kvøld, fríggjakvøld, fara Brandur og hinir á pallin í Rex, har løg av fløguni m.a. verða at hoyra.

Frá P/F Føroya Shell
í Eysturoy

Vit eru flutt
í nýggj hølir.

Skrivstova og
goymsla okkara
eru nú á Rituvíkshálsi

P/F Føroya Shell, Eysturoy

Lesið Sosialin - so eru tit við

TOYOTA



# 25 brúktir bilar við Oyggjarvegin

Í sambandi við at Reyni Service hevur ognað sær økið við Oyggjarvegin, selja vit 25 brúktar bilar fyri serprís á økinum Ringvegur/Oyggjarvegur.

Tiltakið byrjar hósdagin 20. januar kl. 10.00 og heldur fram til leygardagin 29. januar kl. 15.00.

6 mánaða garanti

Reyni Service bjóðar eina eyka trygd til tey, ið ynskja ein brúktan bil, við nærum eins góðari trygd, sum var hann nýggjur.
Vit bjóða 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn kr. 85.000,-

Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eyðsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella vantandi tænastueftirlit.

TEAM85

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040 · Fax 353041
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F